VINNU SÍÐURNAR
VINNA HANDVERK HANDIL
Nr. 231 • hósdagur • 1. desember 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# 40.000 tons av óvirkaðum fiski av landinum um árið




*Útflutningurin av rundum fiski er vaksin nógv seinastu árini*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Árini 2002, 2003 og 2004 útfluttu Føroyar tilsamans 130.000 tons av óvirkaðum fiski**

FISKAVIRKINI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Útflutningurin av feskum fiski er nógv øktur í árunum, 2000-2003, men er síðan minkaður eitt vet aftur í 2004.

Hetta vísa tøl, sum grannskoðarafelagið, Rasmussen & Weihe, hevur við í greiningini um fiskavirkini.

- Serliga í 2001 og 2002 hevur útflutningurin tikið dik á seg og er nærum tvífaldaður hesi árini í mun til árið fyri.

Víst verður á, at í tíðarskeiðnum, 2000-2004, er tað serliga útflutningurin av upsa, sum er nógv vaksin, men útflutningurin av óvirkaðari hýsu, toski og øðrum fiskasløgum er eisini nógv vaksin í tíðarskeiðnum, sigur felagið.

Tað er Føroya Ráfiskakeyparafelag, sum er keldan til tølini yvir útflutningin av feskum heilum fiski.

Tølini vísa, at samlaða nøgdin, sum varð útflutt óvirkað í 2000, var 14.736 tons, men longu árið eftir tvífaldaðist nøgdin og kom uppá 24.235 tons. Aftur í 2002, 2003 og 2004, vóru útflutningstølini stór. Hesi árini vóru tølini ávikavist; 44.674, 43.994 og 40.986 tons.

-Samlaði vøksturin í tíðarskeiðnum árini 2000-2004 var soleiðis 178,1%, men árini 2003-2004 var hann negativur við 6,8%, sigur grannskoðarafelagið.

# Ráfiskanøgdin er nógv minkað

**Eru fiskavirkini ov nógv í tali, ella er neyðugt at fáa meira burtur úr teirri ráfiskanøgd, sum virkini hóast alt fáa hendur á?**

FISKAVIRKINI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tølini hjá grannskoðarafelagnum, Rasmussen & Weihe, vísa, at ráfiskanøgdin, sum fiskavirkini hava keypt, er nógv minkað, sum árini eru liðin.

- Nøgdirnar vuksu hvørt ár, sum greiningin fevnir um, fram til 2002, samstundis sum nýggj fiskavirkir eru komin.

Samlaða lækkingin í ráfiskanøgdini í tíðarskeiðnum, árini 2000-2004, er tilsamans 17,7% - og lækkingin árini, 2003-2004, er 13,6%.

Hetta merkir, at føroysku fiskavirkini hava ilt við at fáa fatur á nóg mikið av ráfiski til virkingar.

- Spurningurin er so, um vit hava ov nógv fiskavirki – ella, um neyðugt er at fáa meira burtur úr teirri ráfiskanøgd, sum virkini hóast alt fáa hendur á, sigur Bjarni Poulsen, sum hevði framløguna herfyri Rasmussen & Weihe.

Framleiðsluvirðið er í tíðarskeiðnum, 2000-2004, fallið 20,7%, men bruttovinningurin er einans minkaður 0,3%.

- Hetta stendst av eini munandi lækking í rávøruútreiðslum og hjálpitilfari. Hesar útreiðslur eru í nevnda tíðarskeiði minkaðar heili 30,5%.

Í greiningini verður víst á, at starvsfólkakostnaðurin er vaksin á hvørjum ári í tíðarskeiðnum, 2000-2002, og hann vaks serliga nógv í 2002, nevniliga 14,0%.

Í 2003 er starvsfólkakostnaðurin minkaður við 0,8% og aftur í 2004 við 5,6%.

-Posturin, "annar rakstrarkostnaður", sum eitt nú fevnir um streymgjald, oljunýtslu, viðlíkahald, reingerð, flutningsgjøld, skrivstovuhald, leigu og annað, er vaksin á hvørjum ári – og árini frá 2000-2003, er talan um ein vøkstur upp á 14,0%.

Rasmussen & Weihe siga, at hesin postur er minkaður munandi aftur í 2004.

# Gjaldførið hjá

*- Tølini benda á, at virðisøkingin samanborið við útreiðsluvøksturin til lønir og aðrar útreiðslur ikki er nóg stór, og tí eru virkini ikki kappingarfør í nóg stóran mun, tá ið ræður um at kappast við útlendskar keyparar um rávøruna, heldur grannskoðarafelagið, Rasmussen & Weihe*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



**- Tað tykist, sum um kappingin um rávøruna við útlandið er munandi harðnað, og tølini benda á, at virðisøkingin samanborið við vøksturin til lønir og aðrar útreiðslur ikki er nóg stór. Tí eru virkini ikki í nóg stóran mun kappingarfør, tá ið ræður um at kappast við útlendskar keyparar um rávøruna**

FISKAVIRKINI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe hevur nú eisini latið úr hondum roknskapargreiningina yvir fiskavirkini, árini 2000-2004.

Greiningin fevnir um tilsamans 10 feløg í 2004 og byggir á almennu roknskapirnar fyri árini 2000-2004. Við í greiningini eru eisini aðrir upplýsingar, sum grannskoðarafelagið hevur frá teimum feløgum, sum í sínum ársroknskapi ikki upplýsa eitt nú ráfiskanøgd, nettosølu og ráfiskakostnað.



Virkini, sum eru við í greiningini, eru P/F Kósin (16,5% av ráfiskinum í 2004), P/F Føroya Fiskavirking (48,5%), P/F Fiskavirkið (8,9%), P/F Vaðhorn Seafood (3,3%), P/F Delta Seafood (5,1%), P/F Sandoy Seafood (9,0%), P/F Norðís (2,8%), Sp/f Eystís (við frá 2000, 1,6%), P/F Vestís (við frá 2002, 0,0%), P/F Suðurís (við frá 2002, 0,0%), P/F Palm Seafood (0,0) og P/F FarIta (við frá 2001, 2,2%).

Tey virkir, sum onga rávøru hava keypt í 2004,